
Ungdóms síðan



Ritstjóri:
MICHEL NIELSEN

Tann løgnasta sjósøgan, sum nakrantíð er sagt frá?

Morgan Robertson var ein av teimum gomlu handilssjómonnunum. Hann var frá tiðini umleið aldarskiftið, tá skipini vóru ring og smá, lítil matur var til, og kanska enn minni lon, men Robertson var ikki eins og hinir sjómenninir. Ístaðin fyri teir vanligu stuttleikarnir, sum langfarasjómenn høvdu fyri, brúkti Robertson fritiðina hjá sær til at skriva sögur.

Gjognum árini hevði hann savnað eitt heilt kuffert fullt av manuskriptum, fyri tað mesta sögur frá havinum, men samstundis hevði hann eisini eina líka stóra samling av avsløgum frá forløgum kring allan heimin. Nei, Morgat Robertson doyði sum ein fátækur sjómaður og sum — kanska tað versta hjá einum kempandi menniskja — sum eitt ókent skald.

Tá hann var deyður fann einkja hansara kuffertið við manuskriptinum hjá Robertson, og hon byrjaði at lesa. Eftirsum hon helt sögurnar vera góðar, fór hon til eitt forlag, og hon hevði so avgjørt meiri eydnu við sær, enn maður hennara hevði havt — í dag útgera sjósögurnar hjá Robertson eina heila bókaseriu.

Ein av hesum sögunum, sum fyrst vórðu útgivnar tá hann var deyður, kann gott vera tann løgnasta sjósögan, sum nakrantíð er sögd frá.

SØGAN UM TITANIC

Tað er sögan um ein stóran linara við fýra skorsteinum, sum bleiv bygdur í Onglandi sum heimsins størsta skip — tað størsta, sum nakrantíð var sæð í sjófarandi vakurleika og góðsku. Hetta skipið fór úr Southampton á jomfrúrtúrin hjá sær, við teimum finastu fólkunum bæði úr Europa og USA umborð. Verðin undraðist á ta ræðuligu stoddina hjá hesum farinum — meir enn 800 føtur langt og meir enn 45.000 tons stórt.

Á ferðini vestureftir tvørturum Atlantshavið, bleiv skiparin noyddur av yvirmonnum í reiðarinum til at seta ferðina upp fyri á henda hátt at geva skipinum størri viðagitni. Uppi við New Foundland rendi linarin beint inn í eitt risaísfjall. Tá vatnið streymaði inn í tann sundurskrædda skrokkin, logdu menn til merkis, at skipið ikki hevði livbátar til øll ferðafólkini, og soleiðis druknaðu tey flestu haruppi í tí iskalda Norðuratlantshavinum.

Navnið á hesum risaskipinum, sum rendi inn í eitt ísfjall á jomfrúferðini frá Southamton til New York og sakk meðan ein so ógilig rúgva av menniskjum druknaðu, var RMS TITAN.

So, hvat løgið er í hasum? kunnu tit spyrja. Hann hevur óivað bert tikið ta ræðuligu hendingina við RMS TITANIC, tikið nakrar stavir burtur frá navninum, og so gjørdi søguna um, hvussu hon var bygd, stødd hennara, hvussu hon sigldi, og hennara ringu lagnu — júst sum alt hendi. Nógvir menn aftaná 1912 hava skrivað bókur ella stuttsögur um TITANIC.

Ja, satt er. Morgan skrivaði um TITANIC, heilt sum tað var, fullkomiliga sum tað alt hendi, við undantak av, at hann ikki tók teir tveir seinastu stavirnar í navninum við.

Tað løgna er, at hann segði frá søguni um TITANIC-ólukkuna, júst sum hon hendi — **tíggju ár áðrenn kjølurin á Titanic varð lagdur! ! !**



Skulu danskir ferðslusyndarar gjalda bót á gøtuni?

NÝGGJ ROYND Í SVØRIKI

Í dag spyrja fólk í Danmark um tey skulu fáa bót frá ferðslupolitinum, beinanvegin, tá brotsverkið er framt. Orsøkin er tann, at soleiðis fer politiið í Svøriki at royna at gera frá 1. januar 1967. Tað er nú ikki allastaðni í Svøriki at hetta verður framt. Fyribils er tað bert í Vestmanland- og Stockholms Län, at teir fara at royna hetta nýggja. Men sjálvandi — fær svenska politiið góð úrslit, fer tað at verða innfort allastaðnis haryviri. Politistarnir skulu tó ikki, sum tað er í dag í Vesturtýsklandi, krevja bótina á gøtuni, men teir skriva bótina niður á eitt serligt kort, sum syndarin so síðani má senda við postinum innan fyri eitt ávist tíðarbil.

IKKI Í DANMARK

Tað er ikki fyrstu fer, danir hava spurt um hetta fer at bliva innført í Danmark. Formaðurin fyri »Rádet for større færdselssikkerhed« hevur ofta sagt seg vera fyri hesum, og politistjórin í København hevði uppskotið frammi fyri 10—15 árum síðani, men í tí danska løgreglumálaráðnum møtti hann tá stóra mótstøðu. Í dag held ur hann ikki tað sama, tí sum hann sigur, »tær flestu ferðslusyndarnir eru viðvikjandi at parkera bilin, og um ein politistur sær ein bil, sum er ólógliga parkeraður, so kann hann ikki standa allan dagin og bíða eftir eigaranum, so at hann kann geva honum bótina. Hertil kemur, at tað bótasystemið, sum vit hava í Danmark er longu sera einfalt. Og so er tað endiliga eisini so, at tað fór ikki at verða so lætt at doma um, hvussu stór bótin skuldi verið. Í dag verður bótin avgjørd alt eftir, hvussu ofta áður bileigarin hevur fingið bót, soleiðis at hon veksur eftir hvussu ofta, hann er dømdur. Um ein politistur á gøtuni skuldi avgjørt bótina, kann hann jú ikki vita, um tað er fyrstu ella tíggjunda ferð, bileigarin parkerar ólóg liga«.

So spurningurin skuldi verið loystur. Teir leiðandi innanfyri politiið siga nevniliga harumframt, at sjálvt norðanlond fáa felags ferðslureglur um nøkur fá ár, fer hetta ikki at galda í Danmark, men ein veit jú ongantíð, hvussu umstøðurnar verða tá.

SOLEIÐIS DØMA TEIR Í SVØRIKI

Politiið í Svøriki fer at fáa eitt fast skema at ganga eftir, tá teir skulu doma. Her siggja tit, hvussu tað fer at siggja út:

At koyra yvir fyri reyðum ljósi	100 kr.
At ganga yvir fyri reyðum ljósi	15 kr.
At koyra við ov litlum ljósi	50 kr.
At koyra við lyktum, ið blenda	150 kr.

At láta vera við at halda við einum stoppskilti:

Knallertir/syklur	100 kr.
Onnur motorakfør	200 kr.

At koyra skjótari enn loyvt er:

Við yvir 15 og undir 30 km/t	200 kr.
Við yvir 30 km/	raport
At snara til vinstru ella høgru, har hetta er forboðið	50 kr.
At ikki ansa eftir fólki í einum fótgangafelti	150 kr.
At láta vera við at steðga fyri fólki, ið skulu við spørvogni	150 kr.
At ganga á einum motor vegi	50 kr.
At ikki at hava bæði bein á pedalunum og bara eina hond á róðrinum	25 kr.
At koyra skúlakoyring á einum motorvegi	150 kr.
At koyra í forboðum ferðslu rætningi	50 kr.
At koyra inn, har gjognum koyring er forboðin	50 kr.
At parkera í myrkri uttan at hava tendrað ljós ella ella refleks	150 kr.


Tit kunnu av hesum siggja, at smásyndirnar lætt kunnu koma at kosta eitt sindur!



BOB DYLAN

eftir KLAVS LUND

Klavs Lund gongur á Christianshavns Gymnasium í København. Av ti at hann gongur í ti musikk málsliga greininum, hava vit biðið hann um at vera musikkstjóri hjá okkum. Umframt greinir viðvikjandi poppmusikkinum, fara vit eisini at fáa greinir um klassiskan musikk frá honum, so at tey, ið hava áhuga fyri slíkum eisini kunnu lesa okkurt á ungdómssíðuni við áhuga.



EIN TANN BESTI FÓLKASANGARIN

Tað er óivað ikki ov nógv avgjørt, tá ein sigur, at Bob Dylan er ein tann besti fólkasangarin í heiminum í dag. Men samstundis er hann eisini tann løgnasti.

Hann er 24 ár og hevur í mong ár verið kendur í USA fyri at hava innspælt nakrar serstakliga góðar LP-plátur. Í Europa vóru inntil fyri einum ári síðani bert fá, ið kendu hann. Fólk høvdu nokk hoyrt, at ein sonevndur harri við navninum Bob Dylan hevði komponerað log, sum t.d. »Blowing in the Wind.« »It ain't me Babe« og »House of the Rising Sun«, men nakran størri kunnleika um hendan mannin, høvdu tey als ikki.

Men fyri umleið einum ári síðani eydnaðist tað honum at sleppa inn á hitlistan — eisini her í Europa. Fyrstu ferð við »Like a Rolling Stone« og seinri við »Rainyday Woman nr. 12835«. Ein pláta, ið gjørdist sera populer í Amerika, var »Times, they're achangin«

MENNISKJAÐ BOB DYLAN

Hvussu er so menniskja Bob Dylan? Ja, tað kann óivað sum um summarið 1965 spældi her her í Føroyum, m.a. á ólavsøku, nú er komið upp í fyrsta rað.

Í ár er ikki meira at gera hjá tí danska landsliðnum. Fótbólturin er goymdur burtur fyri veturin, og vit kunnu gleða okkum til várið, tá hann aftur verður funnin fram til nýggjar spennandi dystir.

kanska tað fylgjandi geva eitt heldur ringt svar uppá, men lítlan bita at vita herum.

Tá Bob Dyln er á eini scenu, roynir hann fyrst og fremst at skapa andaligt samband millum seg og tey sum lurta eftir. Hann hevur ikki nakað ynskí um at sleppa at undirhalda, sum aðrir



Bob Dylan

sangarar vanliga hava, ella at stilla seg sjálvan upp sum nakað serligt. Tað eydnast altíð fyri honum at skapa tað sambandið, sum hann ynskir. Innihaldið í sangunum kemur altíð best fram, tá tað er Bob Dylan, ið syngur. Hann er ógvuliga lítil, og tá hann syngur, ristir hetta lítla skepilsið, eins og hevði hann ilt. Rødd hansara er skørp, ja næstan hvínandi — eins og var tað ein pína at syngja. Tað guitarspælið, hann spælir afturvið



v. TORBEN KROGH



DM í fótbólti

Danmarkarkappingin í fótbólti 1966 er nú liðug. Tað bleiv uppá fleiri mátar ein áhugaverd kapping, og tað endaliga úrslitið bleiv ikki heilt júst sum menn høvdu væntað.

Fyri fyrstu fer í trettan ár fór DM-heitið til eitt lið úr Keypmannahavn, og ikki bert nr. 1 var úr høvuðsstaðnum, men eisini nr. 2 og 3. Tað vil siga, at allar medaljurnar fóru til lið úr Keypmannahavn

Hvidovre Ítróttarfelag varð danmarksmeistari eftir bert tvey ár í fyrsta raði — fyrstu división. Liðið tapti bert tveir dystir av ialt 22 — eitt óført úrslit, um ein skal leita leingi eftir makan til í donsku fótbóltssøguni. Hvidovre hevur gjørt ógvuliga skjótt av í donskum fótbólti. Teir eru farnir uttan at tapa nakran serligan dyst gjøgnum øll røðini niðri frá 4. división uppá eitt ár. Bert í 4. división vóru teir í 2 ár, men annars eru teir farnir durk ígjøgnum allar divisiónirnar. Fyrsta árið í 1. división bleiv liðið nr. 5 — ein sonn dygdargerð — og annað árið also nr. 1 og danmarksmeistarar.

Nr. 2 bleiv liðið Frem og nr. 3 Københvns Boldklub (kanska betri kent undir navninum KB). Sum eg longu havi skrivað, so skulu vit 13 ár aftur í fótbóltssøguna fyri at finna eitt Keypmannahavnar lið á fyrstaplássinum, teir hava fleiri ferðir verið tætt við, men fyrst nú er tað so eydnast.

Tey tvey umboðsliðini hjá Fyn, B1909 og B1913 máttu rýma úr 1. división, men teir høvdu tó tað at ugga seg við, at eitt annað lið frá Fyn, Odense Boldklub, O. B., er sera einkult. So einkult, at tað er lætt at mistonkja hann fyri bert at duga nøkur fá grep. Sannleikin er tó, at hann spælir óføra gott, men hann ynskir, at fólk bert skulu interessera seg fyri tekstinum

Nei, so er tað nakað heilt annað, tá hann spælir saman við einum backingorkestri við elektriskum guitarum. Her skal musikkurin saman við tekstinum gera eina størri eind.

TÓNLEIKURIN ER PERSÓNLIGUR

Tónleikur hansara kann av og á næstan vera svakur, hetta skal undirstrika innihaldið í sanginum Dylan sýnist her at vera í enn nærri samband við áhoyrarnár. Hann ger lítið um seg, tá hann spælir, tí hann hevur so nógv av persónligheit, at hetta ger tað heila fyri hann. Áhoyrarnir verða eisini stillaðir yvir fyri bilot, sanghættir og følilsi, sum ein má liva í fyri at fáa nakað ordiligt burturúr tí. Tíbetur er tað lætt at fylgja honum í hesum, tí man følir av sær sjálvum, at Bob Dylan sigur nakað innan í einum sjálvum. Ein og hvør, ið lurtar eftir honum vil veruliga finna okkurt, sum virkar persónligt. Okkurt, sum viðkemur einum sjálvum. Hetta krevur tó, at ein lurtar sera væl eftir.

BOB DYLAN — HIN SYNGJANDI YRKJARIN

Aftaná eina Bob Dylan-konsert følir ein seg fullkomiliga avslappaðan. Bob Dylan er ongin scenukunstnari, men ein syngjandi yrkjari. Ein og hvør, ið dámar Bob Dylan bíðar alspentur eftir hvat tann maðurin nú vil finna uppá í framtíðini, tí tað fara óivað at koma stór ting frá honum í tí komandi árinum.